Blokkniðurskurður álvarsligar fylgjur

Samstundis sum framstandandi búskaparfrøðingar og fólk í peningaverðini og vinnulívinum ávara um útlitini í samfelagnum fer samgongan undir at skerja 366 mill. kr. av blokkinum, og hetta er ábyrgdarleyst heldur formaður í størsta andstøðuflokkinum

BLOKKNIÐURSKURÐUR
Jan Müller

Í gjár hevði løgtingið 1. viðgerð av uppskoti frá landsstýrinum um at skerja blokkin úr Danmark við 366 mill. kr. í hesum árinum. Tvs. at blokkstuðulin fer frá knappari einari milliard niður á 615 mill. kr. Málið hevur verið viðgjørt á fólkatingi og liggur í løtuni í figgjarnevndini. Teir bíða so at avgeiða málið til løgtingið hevur tikið endaliga støðu til niðurskurðin. Danska figgjarlógin verður ikki endaliga samtykt fyrr enn m.a. hetta málið er komið uppá pláss. Tvs. at triðja viðgerð av donsku figgjarlógini bíðar eftir, at hetta er fingið uppá pláss.

Jóannes Eidesgaard, formaður Javnaðarfloksins, sum skuldi vera framsøgumaður floksins undir viðgerðini í gjár, sigur við Sosialin, at Javnaðarflokkurin fer sjálvandi at gera alt hann er mentur til fyri at sannføra landsstýrisflokkarnar um, at ein so stór skerjing av blokkinum nú kann fáa álvarsligar avleiðingar fyri samfelagið.

– Hyggja vit at støduni í vinnuni í løtuni og eftir framtíðar útlitinum, so sær tað ikki ov gott út. Framstandandi búskaparfrøðingar og fólk í peningaverðini hava verið frammi og ávarað móti gongdini. Eitt nú hoyrdu vit stjóran í Føroya Banka í grein í Dimmalætting gera vart við, at gulltíðin er liðug. Og hetta er so eisini í tráð við tað, sum hendir í løtuni í alingini, í rækjuflotanum, í svartkjaftavinnuni, við toskaprísinum, við saltfiskinum, og oljan, sum summi hava sett so stórt álit til, er enn stór óvissa um. So her eru nakað, sum kann benda á, at tann stóra vakstrartíðin er av. Tí vil eg spyrja, um tað ikki er óðamannaverk at gera henda stóra niðurskurðin.

Formaður Javnaðarfloksins ber ótta fyri, at hóast hesar ávaringar frá fleiri síðum, so fer landsstýrið helst at koyra málið í gjøgnum, tí tað skal vera krúnan á verkinum av teirra sjálvstýrispolitikki í fýra ár.

Nú rættiligt rok er í samgonguni og stevið er farið heldur Jóannes Eidesgaard, at tað hevði verið kærkomið um onkur í flokkunum rætt og slætt meldaði frá – tók sín stuðul til hetta uppskotið aftur. – Tað hevði verið ynskiligt, men eg ivist í tí. Tó at man kann hava illgruna um tað, tá Fólkaflokkurin spælir út við 80 mill. kr. í skattalætta og teir eru við at bróta seg sundur við at fáa anleggslógina fram um tunnil undir Lorvíksfjørð, sum er ein íløga uppá einar 400 mill. kr. Menninir tykjast arbeiða sum um at inntøkurnar og vøksturin fer at halda fram. Og tað beri eg ótta fyri verður ikki so.

Tí mælir formaðurin í tí størsta andstøðuflokkinum á tingi til, at samgongan broytir støðu. Sjálvur er hann sannfórdur um, at veljarin fer at revsa samgonguna fyri hetta uppskotið. – Økkara uppgáva til valið verður at siga veljarunum frá avleiðingunum. Vit hava stórar trupulleikar í okkara vælferðarsamfelag, serliga á heilsuøkinum, har tað eru pengar, sum mangla. Á røktarheimsøkinum er einki gjørt í fýra ár. Tað sær út til, at henda samgongan nú roynir at borðreiða soleiðis, at ein komandi samgonga skal fáa tað trupult. Teir taka tað figgjarliga grundarlagið undan henni. Tað fer at gera tað sera trupult hjá eini nýggjari samgongu at fáa rættað uppá ta skeivu kósina, sum hevur verið í okkara vælferðarskipan.

Blokkniðurskurður í grunn til mentanarligt samstarv í ríkinum

– Føroya løgting eigur at heita á donsku stjórnina um at brúka ein part av blokkniðurskurðinum til mentanarlig samstarv millum Grønland, Føroyar og Danmark. Hetta skjýtur Jóannes Eidesgaard, formaður í Javnaðarflokkinum upp, nú tingið viðger niðurskurð av blokkinum

Jóannes Eidesgaard, formaður Javnaðarfloksins: – Tvíheldur samgongan um blokkniðurskurð skjóti eg upp, at stovnaðir verða grunnar til at stuðla mentanarligum samstarvi millum Føroyar, Grønland og Danmark, og at 40 mill. kr. av blokkniðurskurðinum fara til hetta endamálið

BLOKKNIÐURSKURÐUR
Jan Müller

Nú landsstýrið eftir øllum at døma fer at skerja blokkin við fleiri hundrað milliónum heldur Jóannes Eidesgaard spurningin vera um í hvønn mun man kann bjarga nøkrum tingum aftur. Danska stjórnin kann sjálvandi einki annað gera enn at taka eina avgerð hjá løgtinginum um niðurskurð til eftirtektar.

Men formaður Javnaðarfloksins heldur, at tingið eigur at hyggja at, hvussu íslendingar og danir bóru seg at í 1918, tá blokkurin úr Danmark varð tikin av. Tá varð avtalað at halda fram í einum ávísum búskaparligum samstarvi, har grunnar vórðu settir á stovn, sum skuldu hava sama avkast sum blokkstuðulin. Tvs. at man í veruleikanum kapitaliseraði hann. Ein grunnur var »Dansk Islandsk Fond«, sum Universitetið í Keypmannahavn umsat og sum var uppá eina millión, meðan hin grunnurin, tann sokallaði »Sáttmálagrunnurin«, sum Universitetið í Reykjavík, umsat, eisini uppá eina mill. kr. Endamálið við hesum pengum var, at teir skuldu latast til mentamál, og at man skuldi styrkja tað mentanarliga sambandið millum Ísland og Danmark.

Danir vilja samstarv

Jóannes Eidesgaard vísir á, at nú tað ikki minst frá danskari síðu verður tosað so nógv um, hvussu stóran dent teir leggja á ríkisfelagsskapin, so kundi man kanska gjørt tað meira ítøkiligt, hvat tað er fyri ein pris man setur uppá ríkisfelagsskapin, nevniliga við at byggja upp nakað av samstarvi í ríkinum. Við hesum sipar formaður Javnaðarfloksins til ein meira konstruktivan form fyri samstarvi, har man t.d. eins og í Islandi í 1918 stovnar tveir grunnar. Av teimum 366 mill. kr., sum landsstýrið so fegið vil sleppa av við, koyrir man umleið 10% ella einar 40 mill. kr. í tveir grunnar. Annar grunnurin kundi verið til mentanarligt samstarv millum allar partar av ríkinum, tvs. har Grønland eisini er við. At man roynir at stuðla mentanarligum tiltøkum í ríkisfelagsskapum. Hin grunnurin kundi so verið til gransking í ríkisfelagsskapinum, tvs. gransking av ymiskum slag millum hesum trý londini.

– Tað kundi kanska gingið uppá, at man ikki bara kannaði, hvat er felags í ríkisfelagsskapinum, men eisini tað, sum vit ikki eru felags um. Hvørjir eru ójavnarnir, hvørji eru sereyðkennini og hvør er identiteturin hjá hesum trimum londunum í ríkisfelagsskapinum. Eg trúgvi, at man lættliga kundi fingið nógvar granskarar við uppá at arbeitt við hesum. Vit hava tosað um, at vit hava verið fyri so stórari mentanarligari ávirkan serstakliga frá Danmark, men tað eru nógvar mytur rundan um tað, sum ongantíð eru staðfestar. Kanska man kundi sett granskarar at kanna, hvar tað veruliga brýtur av millum føroyska, danska og grønlendska mentan. Tað ítøkiliga siggja vit sjálvandi í málinum, men tað er eisini á nógvum øðrum økjum.

Styrkja samleika

Jóannes Eidesgaard heldur eisini granskingin eigur at fáa gagn av hesum. Hon fær sum er ótrúliga nógv vælmeinandi orð, men tað hon hevur brúk fyri er pengar. Trupulleikin í tí samstarvi, sum er millum universitetini í ríkisfelagsskapinum er tann, at tey hava ikki ráð til at skifta um lærarar og studentar í nóg stóran mun. Hevði hetta borið betri til hevði tað kunnað styrkt nógv um samleikakensluna hjá hvørjum einstøkum landi men eisini kensluna av, at vit eru í einum felagsskapi.

Fjølmiðlamenning

Jóannes Eidesgaard leggur aftrat, at tað orðaskiftið, sum hevur verið um týdningin og umstøðurnar hjá føroyskum fjølmiðlum er eisini nakað, sum kundi verið tikið við í slíkum høpi. – Tað er einki í vegin fyri, at man kundi gjørt eina endamálsorðing fyri slíkan grunn, sum er so mikið breið, at man eisini lat upp fyri endurbúgving av t.d. starvsfólki í fjølmiðlaheiminum. Trupulleikin við okkara embætisverki, journalistum o.ø. er oftani, at vit koma frá einum donskum útbúgvingarstovni heim uttan at hava nakrar royndir og vit verða verandi her. Isolerað. Og har vit fáa ov lítið av neyðugu impulsunum frá heiminum uttanfyri. Tí átti man at havt eina víðkaða útvekslingskipan, soleiðis at t.d. ein journalistur í føroyska sjónvarpinum fekk farloyvi í eitt hálvt ár fyri at kunna arbeiða í tí grønlendska sjónvarpinum og øvugt sigur hann og heldur fram:

– Kann man finna eina orðing, sum sigur, at man skal styrkja identitetin, samleikan hjá teimum einstøku londunum í ríkisfelagsskapinum, so er væl alt, sum talar fyri í hesum fjølmiðlatíðum eini fjølmiðlaútbúgving í Føroyum við tí uppgávu, sum fjølmiðlar hava í tí demokratiska samfelagnum, og sum er við til at styrkja henda samleika. Jóannes Eidesgaard heldur tí, at umræddu grunnar veruliga kundu gjørt nakað gott fyri allar partar í ríkinum. Hann vil tó ikki siga júst, hvat teir eiga at taka sær av men hetta eru so bara nøkur hugskot.

Danir heslt positivir

– Eg eri serstakliga spentur at hoyra reaktiónirnar frá donskum politikarum til eitt slíkt hugskot. Tí nú hava teir allir kropp á kroppi tosað nógv um, hvussu stóran pris teir sera á ríkisfelagsskapin. Hvat nú um vit taka teir á orði og fara inn og veruliga gera nakað fyri henda felagsskapin. Sjálvt um hetta eru pengar, sum føroyingar ynskja skornar burtur av blokkinum, at man eisini letur hetta fevna um allan ríkisfelagsskapin, tvs. eisini grønlendingar. Tað hevði givið tí eina heilt aðra dimensión.

Fer at tosa við Lars Emil

Jóannes Eidesgaard ætlar sær í hesum viðfangi, at taka málið upp við Lars Emil Johansen, fólkatingsmann, sum kemur til Føroya í næstum. – Eg havi longu avtalað fund við Lars Emil mánadagin, har vit skulu práta um teir trupulleikar, sum hava verið við samtarvinum. Har verður so høvi at vita, hvønn áhuga hann hevur fyri slíkum uppskoti. Kunnu vit fáa hann at taka undir við tí, so fær hetta hugskotið eina heilt aðra styrki enn bert um ein partur av føroyskum politikarum tekur undir við tí.

ítróttur

Nr. 44 • týsdagur • 5. mars 2002 • 76. árgangur • www.sosialurin.fo

Talvsøgan veit ikki um sovorðið

Klaksvíkingar megnaðu ikki at vinna FM heitið, sum teir so at siga høvdu undir borðinum, og nú er fyri fyrstu ferð nakrantíð neyðugt við umdysti um FM fyri lið

TALV
Jóannes Hansen

Liðini hjá Vestmanna og Klaksvikar Talvfelg mugu telva umdyst fyri at avgera FM. Hetta er ongan tíð hent áður í føroysku talvsøguni

Talvfepurin hevur rættiliga fingið fastatøkur í býnum. Tað skrivaði Norðlýsið fríggjadagin sum upptakt til síðsta umfarið í liðkappingini í talvi. Og tað var ikki so undarligt, at klaksvíkingar vóru rættuliga spentir, tí teir tóktust hava beina kós ímóti FM heitinum.

Síðsta umfarið í bestu deildini var á skránni leygardagin. Talan var um felags umfar, sum var telvað í Eysturskúlanum í Havnini. Klaksvíkar Talvfelag hevði dyst á skránni ímóti kollfirðingum, sum ikki hava staðið seg so væl í ár. Havnar Telvingarfelag og Vestmanna Talvfelag hava verið við í kappingini um heiðursmerkini. Tey telvaðu innanhýsis. Tað vil við øðrum orðum siga, at á pappírinum tókust uppgávan hjá klaksvíkingum at vera hópin lættari, enn hon var hjá Vestmanna Talvfelag, sum var næstfremst og sum hevði møguleika at hótta klaksvíkingar. Men møguleikin var ikki mettur at vera serliga stórur.

Á ítróttarsíðunum inni í blaðnum verður meira greitt frá dystunum. Her skulu vit bara staðfesta, at leygardagin varð ikki avgjørt, hvør er FM vinnari í liðkappingini í 2002. Vestmenningar telvaðu sum ongantíð áður og vunnu 3-1 á havnarmonnum, og kollfirðingar telvaðu, sum teir ikki hava gjørt fyrr í ár. Teir vunnu 2 1/2 – 1 1/2 á klaksvíkingum, sum tykjast so at siga hava telvað við hondbremsuni uppi.

Klaksvíkar Talvfelag hevur alt árið verið fremst í liðkappingini, men nú er møguleiki fyri, at tað skal gangast, sum tað gjørdi í fjor. Tá vóru teir leingi á meistarakós, og teir høvdu telvað støðugt og trygt. Men so kiksaðu teir í lyklavdysti, og so struku havnarmenninir avstað við meistaraheitinum. Nú er møguleiki fyri, at Vestmanna Talvfelag skal fara avstað við gullinum. Hvør fer at vinna FM verður avgjørt leygardagin, tá Klaksvíkar Talvfelag og Vestmanna Talvfelag fara at telva umdyst – ivaleyst verður tað í Havnini.

Nýggj støða

At tað er neyðugt við umdysti um FM fyri lið er púra nýtt. Talvsamband Føroya varð stovnað í 1970. Tá varð beinanvegin farið undir liðkapping um FM. Tað hevur verið kappast á hvørjum ári, og tað hevur ongantíð áður verið neyðugt við umdysti.

Er hetta nakað, sum er kent aðra staðni frá, spyrja vit Rana Nolsøe, sum umframt at sita á øðrum borði hjá Klaksvíkar Talvfelag eisini er formaður í Talvsambandi Føroya:

– Eg veit ikki, um tað er komið fyri onkra staðni, men hetta er ikki vanligt. Tað er tað ikki, tí reglurnar leggja uppfyri sovorðnum støðum.

Hvussu tá?

– Hjá okkum siga reglurnar, at tá tað stendur á jøvnum, so eru dystarstigini avgerandi. Tað vil siga, at fyri hvønn vunnan dyst fær liðið tvey stig, eitt fyri javnan dyst og einki, tá liðið tapir. Men í hesum stendur eisini á jøvnum. Bæði KTF og VT hava 14 dystarstig. Aðra staðni er tað soleiðis, at aftan á dystarstig verður roknað við innanhýsis dystum, og um tað eisini stendur á jøvnum, so verður roknað við stigum á fyrsta borði og so viðari. Men hetta verður ikki lagt uppfyri í okkara reglum, sum greitt siga, at umdystur skal til, tá tað stendur á jøvnum í stigum og dystarstigum.

Cup dystur

Í innanhýsis dystunum millum KTF og VT og KTF frammanfyri 4 1/2 – 3 1/2. Men Rani Nolsøe heldur ikki, at hetta kann takast sum ábending um, at KTF er favorittur í umdystinum leygardagin:

– At vit eru javnir í stigum boðar frá, at vit hava ikki staðið okkum so væl ímóti hinum liðunum, sum vestmenningar hava gjørt. Alt er opið. Talan er um eina orduliga cup finalu, har vinnarin fær alt, og har taparin fer at kenna tað, sum hann hevur mist alt. Meiri spennandi fær tað ikki verið, heldur Rani Nolsøe, ið ikki vil taka nakað frá kollfirðingum, sum telvaðu sera væl leygardagin. Men hann ásannar samstundis, at tað er væl skiljandi, um onkur heldur, at klaksvíkingar telvaðu við hondbremsuni uppi, sum tað plagar at verða tíðin til.

– Í umdystinum vita bæði vestmenningar og vit, at tað ikki fer at bera til at vera afturhaldandi. Eg rokni við, at tað verður ein spennandi dystur, og eg vóni, at hann verður ein góð reklama fyri telvingina. Telvararnir eru javnt góðir, og tað liðið, sum leygardagin hevur sinniliga yvirskotið, fer at vinna.

Í gjár dugdi Rani Nolsøe ikki at siga, hvar umdysturin verður, men Talvsambandið arbeiddi við at fyrireika dystin soleiðis, at hann verður vinarligur hjá áskoðarunum. Spenningurin er stórur, og tað kann væl hugsast, at viðhaldsfólk hjá bæði KTF og VT fara at fylgja við, umframt at talvhugað fólk í høvuðsstaðnum fara at hyggja at.

FSV fær tveir úr Brasilia

Niðurflytararnir úr FS Vágum gjørdu bart móti uppflytarunum úr Hvalba, tá tvey av nýggju liðunum í aðru deild hittust í steypakappingini

Mynd: Edvard

Ímóti Royn var spurningurin bara, hvussu stórur sigurin hjá vágamonnum fór at verða

LØGMANSSTEYPIÐ
Jóannes Hansen

Í Vágum tykjast teir vera avgjørdir í, at gongdin frá kappingarárinum í fjor ikki skal endurtakast í ár. Tá var lítið skil á undan summarfrítíðini, og endin var, at FSV flutti niður. Nú er gott skil á, og hugburðurin tykist vera so mikið góður, at FSV avgjørt fer at vera við til at seta dám á doppin í næstbestu deildini.

Albert Ellefsen er venjari, og Jens Erik Rasmussen er hjálparvenjari. Kvalifiseraðum spælarum er tað meira av, enn tað var í fjor, og sunnudagin vóru ábendingar um, at venjingarstøðan er væl betri, enn hon var hesa tíðina í fjor. Men í Vágum ætla teir at fáa meiri fólk:

– Vit hava verið í sambandi við tveir spælarar úr Brasilia. Pappírsarbeiðið er ikki komið heilt upp á pláss enn, men tað er greitt, at hesir báðir koma at spæla fótbólt við FS Vágum. Jens Erik Rasmussen hevur spælt saman við øðrum teirra í Leiftri. Hann eitur Alexander des Silva og er miðvallarspælari í vinstru. Harafturat kemur ein álopsspælari. hann eitur Clayton, og eftirnavnið er tað sama, sum tað er hjá Pelé – de Nascomento.

Tað er Albert Ellefsen, sum sigur okkum hetta. Hann sigur eisini, allir tríggir útlendingarnir, sum í fjor vóru í FS Vágum, eru afturkomnir í ár. Tað vil við øðrum orðum siga, at í FS Vágum verða tað í ár fimm útlendskir spælarar.

Avgreiðsluspurningur

Sunnudagin spældi FS Vágar fyrsta innleiðandi dystin í kappingini um løgmanssteypið. Mótstøðuliðið var Royn úr 3. deild.

Tað var ongantíð nakar spurningur um, hvat liðið skuldi halda fram í kappingini. Heldur var spurningurin, hvussu stórur sigurin hjá FS Vágum skuldi verða.

Í steðginum vóru teir framman fyri 4-0, og í 2. hálvleiki noyddist Kim Mortensen í Royn málinum aftur fýra ferðir í meskarnar. Á liðnum hjá FS Vágum vóru fleiri gamlir kenningar, sum ikki spældu við FSV í fjor. Her verður hugsað um Jens Erik Rasmussen, sum nú er komin aftur úr Leiftri, og um Bjarna Prior, sum er komin aftur úr B36. John Johansen varð so mikið illa skaddur tíðliga á árinum, at hann als ikki var við í landskappingini í fjor.

FS Vágar-Royn 8–0 (4–0)

1–0: Jens Erik Rasmussen 7
2–0: Jens Erik Rasmussen br. 10
3–0: Birgir Joensen 17.
4–0: Kim Poulsen 23.
5–0: John Johansen 53.
6–0: Vladlen Osipov 84.
7–0: Ingi S. Joensen 87.
8–0: Bjarni Prior 89.